

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 04 - 2012

# Umhvørvisatlit í Grønlandi givið Cairn góðar royndir

Oljuboringar undir truplum umstøðum kunnu geva feløgunum virðismiklar royndir, sum tey kunnu nýta gott av aðrastaðni. Tað ásannar Cairn Energy, sum hevur nomið sær royndir í arktiska økinum. Grønlendska Sermitsiaq skrivar, at í samband við fyrstu boringarnar hjá Cairn Energy í Grønlandi, noyddist felagið at taka nógvar avgerðir, sum tóku atlit til umhvørvið. Sum dømi um hetta verður nevnt, at Cairn Energy noyddist at flyta 145 ísfjøll í eitt trygdarøki, sum lá 20 sjómíl frá oljuboripallunum. Hetta fyri at tryggja, at umhvørvisárinini vóru minst møgulig. Blaðið skrivar somuleiðis, at burtursæð frá einum starvsfólki, sum breyt sær økulin í samband við eina trygdarvenjing, so var heldur eingin nevniverdur mansskaði hjá Cairn Energy í Grønlandi. Sostatt hevur Cairn Energy ógvuliga góðar royndir, bæði tá tað kemur til umhvørvisliga og manningarliga partin, í Grønlandi, og tað kemur teimum til góðar, tá tey samráðast aðrastaðni. "Tá vit samráðast við stjórnir um okkara evni til at leita eftir olju, har umhvørvi er ógvuliga avbjóðandi, so tala okkara royndir í Grønlandi fyri seg," sigur Simon Thomsen, forstjóri í Cairn Energy við Sermitsiaq. Hesum er Mike Watts, varaformaður í Cairn Energy, púra samdur við Simon Thomsen í. "Okkara royndir í Grønlandi gera okkum áhugaverd í nógvum londum. Har ynskja tey at samstarva við fyritøkur, sum trúgva upp á kanningararbeiði og sum vita, hvussu hetta arbeiði skal gerast," sigur Mike Watts við Sermitsiaq.